## UTTAN ÚR HEIMI

### Eisini í USA

Undan krígnum í Irak arbeiddi Charles Graner sum fangavørður í einum fongsli í Pennsylvania, og nú er hann lagdur undir at hava nýtt somu framferð har sum í Abu Ghraib-fongslinum í Bagdad. Charles Graner er ein av teimum amerikonsku fangavørðunum, sum eru ákærdir fyri at hava farið illa við irakskum fangum.

Amerikanski felagsskapurin United Against Death Penalty, ið, sum navnið sigur, stríðist ímóti deyðarevsing, sigur seg hava fingið fatur á einum sjónbandi úr eftirlitstólinum í fongslinum í Waynesburg í Pennsylvania, har Charles Graner arbeiddi. Sambært felagsskapinum eru fleiri myndir, ið minna um tað, sum er hent í Abu Ghraib-fongslinum.

– Eitt nú hava vit sæð fangavørðar ganga við einum fanga í tjóðri, júst sum gjørt varð í Irak, sigur Nicholas Yaris hjá United Againgst Death Penalty við donsku tíðindastovuna Ritzau.

### Norðmaður doyði

Ein norskur NATO-hermaður í Afghanistan doyði sunnukvøldið, tá ókendir menn lupu á akfarið, sum hann var í.

Norska herleiðslan sigur, at fimm norskir hermenn vóru í akfarinum. Teir vóru á veg til støðina hjá norsku deildini í Kabul, tá ókendir menn skutu fleiri rakettir eftir akfari teirra. Ein av rakettunum rakti. Ein av hermonnunum varð so illa løstaður, at hann doyði seinni á einum týskum hernaðarsjúkrahúsi.

Norska herleiðslan sigur við Aftenposten, at NATO-hermenn leita eftir monnunum, sum lupu á hernaðarakfarið. Hetta er annars ikki fyrstu ferð, at teir norsku hermenninir í Afghanistan eru vorðnir álopnir. Í mai í fjør vórðu tveir norskir hermenn særdir. 6.500 útlendskir hermenn undir NATO-leiðslu eru í Afghanistan, og 83 útlendskir hermenn eru falnir har. Tá eru amerikanskir hermenn ikki taldir við.

### Barsebæck ikki trygt

Tveir kjarnorkuráðgevar, sum hava kannað trygdarskipaninar á kjarnorkuverkinum Barsebæck við Oyrasund, halda ikki, at verkið er nóg væl tryggjað ímóti yvirgangi, skrivar blaðið Dagens Nyheter.

Annar ráðgevin, Lars-Olof Høgland, sigur við blaðið, at tað er ikki bara á verkinum í Barsebæck, at trygdin er ikki nóg góð, men at hetta er eisini galdandi fyri hini svensku kjarnorkuverkini. Hann sigur, at undir kanningunum hava teir staðfest, at tað hevði verið rættiliga lætt hjá yvirgangsmonnum at søkt at verkunum. Harafturat heldur hann ikki, at myndugleikarnir hava eina ætlan um, hvatskal gerast, um yvirgangsmenn søkja at einum av teimum svensku kjarnorkuverkunum.

Teir báðir ráðgevarnir vóru í gjárkvøldið í Keypmannahavn og greiddu frá sínum kanningum. Danir og serliga fólk í Keypmannahavn hava leingi kravt, at verkið í Barsebæck skal latast aftur.

### Bush datt

Amerikanski forsetin, George W. Bush, datt, tá hann leygardagin var farin ein súklutúr á garði sínum í Texas.

Talsmaður forsetans, Trent Duffy, greiddi frá, at forsetin hevði singið nakrar skeinur á báðar armarnar, høkuna og nøsina, og at hann hevði fingið sár í høgra lógva. Hetta sást eisini á myndum, sum vórðu tiknar av forsetanum sunnudagin.

Sambært Trent Duffy slapp forsetin væl. Tað, sum gjørdi, at hann ikki fekk størri skaða, var, at hann hevði fallhjálm á høvdinum og tannaverju í munninum. Sambært tíðindastovunum hevði tað regnað illa í Texas, og forsetin var tí helst sliðin á súkluni.



*Ein eldri palestinsk kvinna við leivdirnar av húsunum, sum ísraelski herurin javnaði við jørðina. Hetta minnir um tað, sum nazistarnir gjørdu, sigur ein ísraelskur ráðharri*

*Mynd: Reuters*

# Framferðin hjá Ísrael minnir um nazistarnar

**– Ísraelska framferðin at bróta niður húsini hjá palestinum minnir meg um tað, sum nazistarnir gjørdu ímóti mínum foreldrum, sigur ísraelski løgmálaráðharrin**

ÍSRAEL

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Yosuf Lapid, løgmálaráðharri, kom við teimum hugvekjandi orðunum á einum stjórnarfundi um vikuskiftið, skrivar tíðindastovan AP. Har kravdi hann, at Ísrael skal gevast við at bróta húsini hjá palestinum niður alt fyri eitt.

– Hetta minnir meg um tað, sum nazistarnir gjørdu ímóti mínum foreldrum, segði ráðharrin. AP skrivar, at orðini hjá Yosuf Lapid vaktu stóran ans á stjórnarfundinum, og at hann mátti leggja rygg til nógvar og harðar atfinningar.

Aðrir ráðharrar greiddu aftan á stjórnarfundin frá, at løgmálaráðharrin hevði ikki borið Ísrael saman við nazistarnar, men at ein mynd av einari palestinskari kvinnu uttan fyri tey sundursoraðu húsini í Gaza hevði mint hann um tað, sum hendi ommu hansara undir Holocaust.

Sjálvur segði Yosuf Lapid, at tað ber ikki til at fyrigeva teimum, sum fara soleiðis við einari eldri kvinnu.

Sambært AP vóru teir víðgongdu ráðharrarnir á høgravonginum í øðini um orðini hjá løgmálaráðharranum. Ariel Sharon, forsætisráðharri, segði, at viðmerkingar sum tann hjá Yosuf Lapid eru sum at bera brenni á uppreistrarbálið.

# Flogfør mundu stoytt saman

**Eitt mistak hjá indonesiska flogeftirlitinum mundi gjørt, at tvey flogfør stoyttu saman**

Tað var tann 22. mars, at tvey flogfør av slagnum Boeing 767 mundu stoytt saman, men ikki fyrr enn í gjár bórust tíðindini.

Annað flogfarið var á veg til Ný Sælands, og tann ný sælendski flogskiparin segði í gjár, at tað var trygdarskipanini umborð á flogførunum fyri at takka, at tey ikki stoyttu saman. Hann segði, at flogførini vóru í somu hædd og á veg ímóti hvør øðrum. Tá nakrir fáir hundrað mettar vóru ímillum teirra, boðaðu trygdarskipaninar frá, og tað eydnaðist flogskiparunum at forða samanstoyti.

Sambært tí ný sælendska flogskiparanum var tað tað indonesiska eftirlitið, sum gjørdi eitt mistak.

# Farmaskip sakk við 4.000 bilum umborð

**Leygarkvøldið stoyttu eitt bilskip og eitt tangaskip saman nærhendis Singapore. Sunnudagin sakk bilskipið**

SIGLING

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

"MV Hyundai No. 105" hevði ikki færri enn 4.000 nýggjar bilar umborð, tá skipið stoytti saman við tangaskipið "Mt. Kaminesan", sum var fermst við næstan 280.000 tonsum av ráolju.

Havnarmyndugleikarnir í Singapore varnaðust, at skipini fóru at stoyta saman, og hóast teir báðir skipararnir tosaðu við hvør annan, stoyttu skipini saman. Tangaskipið fekk ikki stórvegis skaða, men bilskipið fór til botns við øllum teimum 4.000 bilunum.

Teir 20 menninir, sum vóru við bilskipinum, vórðu bjargaðir.





# RIMMAR EM-KAPPING

Tað er ikki long tíð, áðrenn EM-kappingin í fótbólti fer á rull. Ivaleyst er spenningurin undan hesum stórur hjá flestu fótbóltshugaðum føroyingum, men nú kann hesin gerast enn størri.

Saman við Kiosk Steinatún fer Sosialurin nevnliga at skipa fyri einum EM-spæli, har hópur av góðum vinningum standa upp á spæl. Og vinnarin fær einki minni enn eina fótbóltsferð eftir egnum ynski í Europa, soleiðis at til ber at vitja hjá júst tí liðnum, sum liggur tínum hjarta nærmast.

Hjá luttakarunum ræður her um at gita, hvussu útfallið í teimum 31 dystunum í EM-kappingini verður. Hetta verður gjørt við at fylla út veddingarseðlarnar, sum verða at fáa í blaðnum undan og undir EM-kappingini, og síðani skulu hesir sendast inn. Men fyrst skal liðið ella liðini hjá tær teknast til kappingina við niðanfyristandandi haldaralepa.

Eru ivamál, ber altíð til at ringja og spyrja seg fyri, og skal hetta gerast á **tlf. 22 01 06**

## VINNINGARNIR

Vinningarnir, sum verða latnir besta veddaranum, eru hesir:

1. Ein fótbóltsferð eftir egnum ynski til dyst í Europa. Latin av MB-Tours
2. Ein ferð til dyst millum FCK-Brøndby, latin av MB-Tours
3. Ein Apex-ferðaseðil frá Atlantic Airways
4. Gávukort frá Føroya Bjór áljóðandi 1.500 kr.
5. Eitt gávukort frá Thomas Dam ítrótti á 1.000 kr.
6. Ein døgurði fyri tvey á Hotel Føroyum
7. Árskort frá HB
8. Árskort frá B36

## REGLUR FYRI EM-SPÆLIÐ

- Tekningarlistin til stóru EM-kappingina í fótbólti verður at fáa í Sosialinum. Ynskir tú at taka lut í kappingini, verður seðilin niðanfyri útfyltur og sendur inn.
- Kostnaðurin fyri luttøku er 100 kr. fyri hvørt liðið. Hvør luttakari kann væl hava fleiri lið, og skulu hesi tá navngevast við *nummari*. T.d. Hans Hansen 2. Luttakarin hevur tá sjálv/ur ábyrgdina av, at navnið á liðnum er rætt útfylt, tá veddingarseðlar verða sendir inn. Eisini tey, sum taka lut við einum liði, skulu útfylla teigin til nummarið, sum tá bert er 1.
- Luttøkugjaldið skal flytast á konto í peningastovnunum. Antin á 6460-168.583.1 ella á 9181-141.977.5. Tilmeldingin er galdandi, tá vit hava skrásett inngjaldið. Navn á liði skal tilskilast á inngjaldinum.
- Í kappingini verður spælt 1x2. Sum dømi kunnu vit nevna dystin, Danmark-Italia. Roknar tú við, at Danmark vinnur, skrivar tú 1. Heldur tú at javnleikur verður úrslitið, skrivar tú x, og um tú heldur, at Italia fer at vinna dystin, skrivar tú 2. Soleiðis krossar tú av allar 31 dystirnar í kappingini. Tann spælarin, sum hevur gitt flestar dystir rætt, vinnur kappingina.
- Fimm umfør verða í kappingini, og verða veddingarseðlar fyri hvørt umfarið sær at finna í Sosialinum, har ein veddingarseðil verður fyri hvørt umfarið í kappingini. Fyri hvørt umfar skulu luttakararnir fylla út veddingarseðilin og senda hann inn innan evstamarkið, sum er prentað á seðlinum. Einans seðlar, *sum eru kliptir úr Sosialinum, verða roknaðir sum galdandi*. Er talan um avrit av seðlum, verða hesi ikki tikin við.

Evstamark fyri tilmelding er leygardagin, 5. juni, og eiga bæði luttøkuseðil og gjald at vera okkum í hendi innan ta tíð, um tilmeldingin skal verða galdandi.

**At senda til: EM-spælið, postsmoga 3341, FO-110 Tórshavn**

Fornavn ____________________

Eftirnavn ____________________

Føðingardagur ____________________

Lið nr: ____________________

Bústaður ____________________

Postnr. og staður ____________________

Sosialurin & Kiosk Steinatún